# Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000, fyrr 72.000,-
**nú 69.000,-**

**Saab 9-3 TiD 2.2** svartur, árg 2001, 5 hurðar, km. 35.000
**195.000,-**

**Nissan Almera 1.8 Elegance** bláur, árg 2000, 5 hurðar, km 52.000
**99.800,-**

**Honda Accord 1.8i** grønur, árg 1998, 4 hurðar, km. 69.000
**110.000,-**

**Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000, fyrr 67.000,-
**59.000,-**

**Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000, fyrr 155.000,-
**nú 129.000,-**

**Nissan King Cab 4x4 2.5 Dti Navara** bláur, árg 2002, 2 hurðar, km. 17.000, *seldur f. kunda*
**215.000,-**

**Seat Cordoba 1.9 D Station Car** gráur, árg 2000, 5 hurðar. km. 38.000, fyrr 109.000,-
**nú 99.000,-**

**Nissan Terrano 3.0 Di Sport Van** grønur, árg 2002, 3 hurðar, km. 25.000
**199.700,-**

**BMW 3 Serie** grønur, árg 1987, 4 hurðar, km. 120.000
**33.000,-**

**Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000, fyrr 112.000,-
**nú 99.000,-**

**Ford Escort** bláur, árg 1996, 4 hurðar, km. 54.000
**59.000,-**

**Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg. 1996, 4 hurðar, km. 195.000
**69.000,-**

**Renault Megane 1.6** grønur, árg 2000, 5 hurðar, km. 68.000
**98.000,-**

**Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, *sýn 24/03/04*
**95.000,-**

**Citroen Xantia 2.0 Hdi SC** grønur, árg 2000, km. 110.000, *sýnaður: 19/03/04,* fyrr 148.000,-
**nú 119.000,-**

**Opel Corsa 1.2** grønur, árg. 2002 5 hurðar, km. 31.000
**v/mvg 99.000,-**

**Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 92.000
**89.000,-**

**Opel Corsa Combo Van D** bláur, árg. 2002, 4 hurðar, km. 16.000
**v/mvg 112.000,-**

Sosialurin 341800

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

# Íbúð í Havn til leigu

Við hesum verður íbúð D í ognini Torfinsgøta 23 við hesum lýst til leigu. Íbúðin er uml. 50 m² til støddar, við stovu, sovirúmi, entré, køki og baðirúmi. Mánaðarliga leigan er í løtuni kr. 3.300 íroknað hita, men uttan el. Limir í »Pensionskassen for Sygeplejersker«og sjúkrasystranæmingar hava framíhjárætt.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um navn, bústað, føðingardato og møguligum limaskapi í pensiónskassa verður at senda undirritaða áðrenn 20. mai 2004.

Nærri upplýsingar annars fáast við at venda sær til skrivstovu undirritaða.

**Annfinn V. Hansen, adv.**
Bryggjubakki 22, boks 106
110 Tórshavn
tlf. 359595, telefax 359596
T-postur: advokat@advokat.fo

# Bátastevnan

*í Vestmanna leygardagin 15. mai 2004*

**SKRÁ:**

**Kl. 14.00-19.00** Søluframsýning inni á Atlantis við útgerð til bátar, frítíðarlív og sjóvinnu.

**Kl. 14.00-23.30** Framsýning av kampingvognum á keiøkinum.

**Kl. 14.30** Allir bátarnir savnast við Fútaklett. Gamli postbáturin "Ólavur" tekur ímóti og skipar innsiglingina til Vestmanna.

**Kl. 15.30** Bátarnir koma inn móti keiini við Føroya Fiskavirking, har teir verða skrásettir. Vestmanna hornorkestur spælir.

*So hvørt sum bátarnir eru lagdir uppá pláss fáa bátsmanningarnar heita suppu við onkrum góðum afturvið inni á Atlantis.*

**Kl. 16.00-20.00** Mini-tivoli í ítróttarhøllini við fiskibrunni, bóltkasti, seymsláing, klatriveggi, andlitsmáling, kaffisølu, skot uppá mál, tombola og myndatøku.
Ponyríðing verður uttanfyri høllina.

**Kl. 16.30-22.00** Vatnskutarar á vágni. Høvið verður at royna vatnskutararnar, sum sigldu til Danmarkar í fjør summar.

**Kl. 23.00** Náttbussurin koyrir úr Steinatúni í Havn og steðgar á vanligum støðum.

**Kl. 23.00-04.00** Dansur í ítróttarhøllini við bólkinum Moonshot og Thunder Birds. 18 ára aldursmark.

**Kl. 00.30** Náttbussurin koyrir úr Steinatúni í Havn og steðgar á vanligum støðum.

*Náttbussurin koyrir úr Vestmanna eftir dansin*

Sosialurin



Hestprent gevur pappírinum betri flog

HESTPRENT
– tí pappír hevur uppiborið tað besta

Sosialurin

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2509, Sp/f Hotel Eiði, 470 Eiði.

Viðtikið 21.04.2004 at lækka partapeningin við kr. 150.000,00 til kr. 250.000,00 til kurs 100 við útgjalding til partaeigarar, eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 6. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1927, P/F Hotel Føroyar, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Tórmóður Djurhuus, Hvítanesvegur 19, 188 Hoyvík (formaður).
**Innkomin sum formaður:** Jóannes á Váli, Marknagilsvegur 12, 100 Tórshavn
**Innkomin í nevndina:** Jens Kári Vilhelm, Gróthúsvegur 19, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 6. mai 2004
Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2051, Sp/f Húsarøkt, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 23.04.2004.
**Nýtt navn:** Sp/f 22. apríl 2004
Stjórn:
**Farin frá sum stjóri**: Aleksandra Jóhannesardóttir av Skarði, Dalavegur 19, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 6. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 218, P/F Sandavágs Timburhandil, 360 Sandavágur.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Magne Sigfríð Thomsen, 360 Sandavágur.
**Innkomin sum stjóri:** Albert Ari Thomassen, 360 Sandavágur.

*Skráseting Føroya tann 6. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 3000, Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Bjarni Birgir Petursson, Heygsbreyt 18, 100 Tórshavn
**Farin úr nevndini:** Dánial Pauli Djurhuus, 350 Vestmanna..
**Innkomin í nevndina sum formaður:** Sofus Joensen, Ovaragøta 70, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 6. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3442, Sp/f Føroya Bilshine, 625 Glyvrar.

**Viðtøkur broyttar:** 19.03.2004.
**Nýtt navn:** Sp/f T. C.
**Nýtt hjánavn:** Sp/f Tausen Contractors (Sp/f T. C.)

*Skráseting Føroya tann 6. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan**:

Skrásetingar-nr. P/F 1724, P/F Taravík, 700 Klaksvík.

**Viðtøkur broyttar:** 15.04.2004.
**Nýtt hjánavn:** P/F Faroe Salmon

*Skráseting Føroya tann 6. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 200, P/F Føroya Shell, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Lars Erik Clausen, Stenløkken 90, DK-3460 Birkerød (formaður), Óli Zachariassen, 512 Norðragøta (næstformaður) og Sámal Jens í Skorini, 470 Eiði.
**Innkomin í nevndina:** Tanya Kabalin, Flat 52, 55 Ebury Street, London SWIW OPB (formaður), Tummas Johan Hansen, Olsbækdal 42, DK-2670 Greve (næstformaður) og Ole Andreas Rugeldal, Vordingborggade 25, 2.th., DK-2100 København.

*Skráseting Føroya tann 6. mai 2004*
*Kristin Balle*

---




Sosialurin

**PEUGEOT 306 GTI**
**187 HK • Árg. juli 1999 • km. 73.000**
Ring **tel. 251 800**

# Søkt verður eftir fólki

**at gera ferðafólkakanning á Flogvøllinum í Vágum. Starvið verður at seta sum skjótast.**

**Arbeiðstíðin er:**
- uml. 40-50 tímar um mánaðin
- skiftandi arbeiðstíðir
- eisini nøkur vikuskifti

**Førleiki**
*Vit rokna við at tú:*
- tosar skandinaviskt og enskt
- er fyrikomandi
- er opin og tilreiðar at spyrja fólk
- kann arbeiða skiftandi arbeiðstíðir

Løn eftir avtalu.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Felagið Vágar
370 Miðvágur

Fleiri upplýsingar um arbeiðið fáast við at venda sær til Felagið Vágar og tosa við Annu-Sofíu Nordendal, telefon 333 455 ella 353 300 ella senda teldupost til vagar@post.olivant.fo

FELAGIÐ VÁGAR

Telefon: 333 455 • 353 300

Sosialurin

**Góðska á hægsta støði, hevur eitt navn!**
**Spyr sjálvandi eftir**
ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR



# Gerið kvettið:

**1 Echostar boks og 1 skermur**

**Við í prísinum eru:**
- 10 rásir frá BBC
- 4 andaligar rásir
- 1 barnarás
- 2 filmrásir
- 3 tíðindarásir
- og fleiri aðrar

Fyri einans **2.995,-**

**Allar eru gjaldsfríar rásir**

**Dragon modulir, ið kenna næstan alt, eru nú aftur at fáa fyri kr. 1.500,-**



**Alt til parabol og sjónvarp nú á goymslu, so sum motorar modulir og mangt annað**

**Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 42 14 11 ella 215 328**




**Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline**

Sosialurin

# Skúlastýrisvalið

Vallistin til skúlastýrisvalið tann 25. mai 2004 liggur frammi á kommunuskrivstovuni frá 30. apríl til 18. mai 2004.

Tey, ið enn ikki hava skrásett seg til vallistan, kunnu gera hetta við at venda sær til valnevndarformannin áðrenn 18. mai.

Seinasta freist at lata valevnislistar inn er 18. mai kl. 18.00.

Atkvøðugreiðsla til skúlastýrið verður 25. mai frá kl. 14.00 til 20.00. Valið fer fram í somu hølum sum onnur val í kommununi.

Veljarar, sum ikki kunnu møta valdagin, kunnu við at venda sær til formannin í valnevndini atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi kl. 18.00 dagin fyri valdagin.

**Valnevndin**

# Kunngerð

## um innangarðs-útskiftingarfund í Hesti

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, §79, verður boðað til útskiftingarfund í Hesti mikudagin 12. mai 2004 kl. 10.00 í Bygdastovuni.

Til viðgerðar verður innangarðsútskifting av Hests bygd.

Nevndarlimirnir eru Jytta Juul, Funningur og Jákup Skoradal, Miðvágur.

Tórshavn, tann 4. februar 2004

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

www.javnadarflokkurin.fo

**Norðoyar Javnaðarfelag**

Aðalfundur og fyrsti uppstillingarfundur til Býráðsvali verður í Bøgøtu 3 hóskvøldið 13. mai kl. 20.

Skrá sambært lógum felagsins.

***Nevndin***

**Ítrottarhøllin í Vestmanna**
**á bátastevnuni**



**Kl. 16.00-20.00** Mini-tivoli í ítróttarhøllini við fiskibrunni, bóltkasti, seymsláing, klatriveggi, andlitsmáling, kaffisølu, skot uppá mál, tombola og myndatøku. Ponyríðing verður uttanfyri høllina.

**Fyriskiparar VÍF Gentir og dreingir 12 ár**

# Skrivstovu-næmingur

Søkt verður eftir skrivstovunæmingi til advokatskrivstovu okkara.

Skrivstovunæmingurin skal hava eina miðnámsútbúgving og duga at nýta tekstviðgerð. Dentur verður lagdur á góðan málkunnleika, og at tann, ið settur verður, dugir væl at skriva føroyskt, danskt og enskt.

Skrivstovunæmingurin kemur at arbeiða í móttøkuni, skriva fyri ymsar advokatar, umframt at taka sær av telefon, posti og at arbeiða við innheintingarmálum og øðrum fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Áhugað verða biðin um at venda sær til skrivstovu okkara við skrivligari umsókn í seinasta lagi 15. mai 2004.

**Advokatfelagið við Strond**
Yviri við Strond 4
110 Tórshavn
Tlf. 311260, fax 311261
e-mail: advokatfelagið@kallnet.fo
Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv.